**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 57/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.** (Eftirlønargjald sambært Eftirlønarlógini leggjast aftrat dagpeningaveitingini)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Eyðgunn Samuelsen, hevur lagt málið fram 2. november 2018, og eftir 1. viðgerð 15. november 2018, er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20., 27. og 29. november 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í almannamálum, Eyðgunn Samuelsen.

Við hesi lógarbroyting fara persónar, sum fáa dagpening vegna sjúku, at fáa eftirlønargjald lagt aftrat veitingunum.
Nevndin fegnast um, at hesar broytingar verða gjørdar og mælir til at samtykkja uppskotið.

<u>Harafturat hevur Sonja Jógvansdóttir hesar viðmerkingar:</u>
Tá ið pensjónslógin var samtykt á vári 2018, heitti meirilutin í Trivnaðarnevndini á landsstýrið um at gera uppskot um, hvussu eftirlønarviðurskiftini hjá fyritíðarpensjónistum skuldu skipast frameftir, ásannandi at fyritíðarpensjón ikki er eftirlønargevandi eins og løn, almennar veitingar og stuðul. Verður onki gjørt, verða fyritíðarpensjónistar á ellisárum fíggjarliga verri fyri enn allir aðrir bólkar av pensjónistum í framtíðini.
Heitt verður enn eina ferð á landsstýrið um at loysa spurningin um eftirlønarviðurskiftini hjá fyritíðarpensjónstum, so hesir frameftir verða tryggjaðir í pensjónsárunum.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Trivnaðarnevndin, 29. november 2018**

Katrin Kallsberg
formaður

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
næstformaður

Óluva Klettskarð

Jenis av Rana

Djóni Nolsøe Joensen

Sonja Jógvansdóttir

Kaj Leo Holm Johannesen